# Hvat skal løgtingsvalið snúgva seg um

**Vit hava hitt nøkur fólk á gøtuni og spurt, hvat tey halda politikararnir skulu leggja dent á til hetta løgtingsvalið.**

FÓLK Á GØTUNI
*Solby A. Eliasen*

**Hanna Mørkøre, sparikassakvinna:**



- Eg haldi, stutt og greitt, at politkararnir skulu leggja dent á at halda tað tey lova, um tey koma inn á ting.

**Hennibeth Kalsø, skrivstovukvinna:**



- Tað týdningarmiklasta má vera at tað fíggjarliga er í ordan. Politikararnir mugu also lata vera við at opna landskassan so nógv upp beint upp undir val. Valstríðið er alt ov dýrt, haldi eg.

- Eisini haldi eg, at skúlaverkið í Føroyum er eitt mál, sum leggjast má stórur dentur á. Skúlaverkið er í vánaligum standi og má betrast munandi í komandi valskeiði.

**William McCleod Jacobsen, ungdómsráðgevi í Norðoya Sparikassa:**



- Eg haldi, at politkararnir skulu fáa skil upp á hvat føroyingar vilja. Og tey skulu eisini fáa stungið út í kortið eina politiska kós, sum føroyingar kunnu vera nøgdir við.

- Verandi trupulleikar og ivamál mugu loysast, áðrenn vit yvir taka nýggj øki og onnur mál, tí alt ov nógv liggur bert og flýtur politiskt. Tað má ruddast upp í tí sum er, áðrenn man fer í holt við meira.

# Leggja dent á tey bleytu virðini

**- Sum kvinna havi eg møguleika fyri at leggja dent á tey bleytu virðini, sigur Erikka Eltør, sum er eitt av valevnunum hjá Sambandsflokkinum í Norðoyggjum.**

LØGTINGSVALIÐ 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*



**Klaksvík:**
Hetta er fyrstu ferð, at 27 ára gamla Erikka Eltør stillar upp til eitt val, men hóast tað hevur hon góðar vónir.

- Einaferð skal jú verða fyrstu ferð, sum hon sigur.

- Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri politikki, og havi verið við í hvørjum kjaki heima við hús, sigur Erikka, sum eisini altíð hevur havt sínar egnu meiningar viðvíkjandi politisku støðuni her á landi.

## Kvinnur skyldu at stilla upp

Erikka sigur, at sum kvinna er tað hennara skylda at stilla upp.

- Tað verður so nógv tosað um, at ov fáar kvinnur eru inni á tingið, men hóast tað stillar eingin upp. Tí kenni eg tað sum mína skyldu at verða við hesu ferð, sigur Erikka Eltør.

- Sum kvinna er tað tær ótilvitað álagt at tosa um tey bleytu virðini, og tað bilar heldur einki. Menninir gera tað jú ikki, so tí mugu vit kvinnur taka um tann leysa endan, sigur Erikka.

- Undanfarna samgongan hevur ikki fingist nógv við nakran familjupolitikk, so tað er eitt av málunum, sum eg ætli mær at arbeiða við. Her hugsi eg um ein aktivan barna-, ungdóms- og familjupolitikk, sum kann verða við til at betra um umstøðurnar her á landi, greiður Erikka frá. Haraftrat heldur hon, at tey eldru í samfelagnum eiga at fáa betri sømdir, enn tey fáa í dag.

- Ein aktivur eldrapolitikkur merkir ikki bert at byggja eitt nýtt ellisheim. Har eru so nógv onnur ting, sum ein kundi arbeitt við viðvíkjandi teim eldru, sigur hon.

- Um kvinnurnar í Føroyum ynskja nakrar broytingar viðvíkjandi familjupolitikkinum, sum verður førdur í dag, so er umráðandi, at tær velja kvinnur inn á ting, sigur Erikka Eltør, valevni Sambandsflokksins í Norðoyggjum.





# Prestur og politikkur hóska ikki saman

**- Eg havi tað sum prinsipp ikki at stilla upp til val, sigur Hans Eiler Hammer, prestur í Norðoyða Vestara prestagjaldi**

LØGTINGSVALIÐ 2002
*Solby A. Eliasen*



- At vera prestur og aktivur í politikki hóska ikki saman, sigur Hans Eiler Hammer.

Hann sigur, at ein sum prestur skal vera uttanveltaður, og blandar ein seg so upp í politikk er tað torført at vera uttanveltaður.

- Tá ein velur at stilla upp fyri ein flokk, má ein standa inni fyri øllum sum flokkurin stendur fyri. Eisini tað tú ikki tekur undir við.

Hans Eiler sigur, at nógv gylt lyfti verða givin í einum valstríði, sum ikki verða hildin. Og, óansæð, so fegin ein vil, so kemur tú eina ferð fyrr ella seinni, í eina ella aðra støðu har tú ert so pressaður, at tú noyðist at lúgva teg burtur úr henni.

- Tað er ein støða, sum tú, sum prestur ikki mást koma í, sigur Hans Eiler.

## Eldra politikkur má standa í hásæti

Hans Eiler sigur, at valið má snúgva seg um annað enn loysing og samband. Hann vísir á, at eitt nú eldra politikkurin má raðfestast høgt.

- Til hvørt val verður lovað í eyst og vest um eldrarøkt, og alt ljóðar so gott, men onki hendir, sigur hann.

- Tað má broytast. Tað kann ikki vera meiningin, at tey eldru í landinum ikki hava nóg mikið at liva fyri um mánaðin.

Hans Eiler heldur, at ikki at vilja lova ov mikið er ein góður hugburður. Ikki at seta nøkur tøl á nakað, tí ongin veit hvussu mikið verður til tað einstaka málið, áðrenn valið.

- Um vit hugsa um tað farna valskeiðið, so hevur sitandi samgonga ikki hildið meir enn helvtina av tí, sum bleiv sett út í kortið fyri fýra árum síðani. Her hugsi eg millum annað um, fullveldið, fólkaatkvøðurnar, sum skuldu havt verið og skattalættar, sigur Hans Eiler.

- Tey koma við dýrum lyftum, og vit, um man kann siga tað so, hoppa upp á tað hvørja ferð, sigur Hans Eiler, sum heldur, at fólk eru lættkeypt og gloyma ov skjótt.

- Eg vil ikki undirmeta veljaran, men eg haldi fólk gloyma alt ov skjótt. Her hugsi eg um, at tað er tað sama hvørja ferð. Politikkararnir lova og halda ikki, fólk verða skuffað og ill, men við næsta val, verða tey somu fólkini vald aftur. Tað er at undrast á, heldur Hans Eiler Hammer.

- Ella hava hesir politikkarar ein sera trúfastan veljaraskara.

Hans Eiler vísir eisini á ta dýru eykafíggjarlógina, sum fyri fýra árum síðani var upp aftur dýrari enn hon er nú.

- Hvar koma pengarnar frá? At skera blokkin niður og samtykkja eina eykafíggjarlóg, má geva minus í landskassan, sigur hann. - Um ikki, so má eg undrast.



## Polariseringin er sera týðulig nú

Hans Eiler Hammer sigur, at polariseringin til hetta valið er sera týðulig, vegna spurningin um samband ella loysing. Og tá prátið kemur inn á veljarakanningina hjá Sosialinum, sigur hann við einum skeivum smíli:

- Um kanningin heldur, verða tað Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, sum skipa samgongu, Tjóðveldisflokkurin verður parkeraður og Fólkaflokkurin... ja, hann verður onkunstaðni ímillum.

Eg vænti, at bæði Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin fara at fáa nógvar atkvøður. Fólk vilja gardera seg. Her hugsi eg um, at tað eru mong, sum ganga inn fyri sjónarmiðjunum hjá Javnaðarflokkinum, men av tí at tað er eitt sindur ullint um Javnaðarflokkurin í tí longra endanum fer at vera fyri ella í móti loysing, so velja fólk heldur Sambandsflokkin til hetta valið. Tjóðveldisflokkurin fær eisini nógvar atkvøður, serliga frá teimum ungu. Unga Tjóðveldið ger eitt megnar arbeiði fyri søkini, og tað fer uttan iva at geva úrslit til valið, sigur Hans Eiler.

## Miðflokkurin ov ótýðiligur í fullveldismálinum

- Veljarin veit, hvat Miðflokkurin gevur út, men ikki um hann tekur undir við samband ella loysing, sigur Hans Eiler, sum heldur stevnuskránna hjá flokkinum vera sera góða kortini.

Hann heldur, at tað er torført fyri veljaran at síggja hvat ein flokkur, sum liggur á miðjuni, stendur fyri í einum máli sum til dømis fullveldið.

Hans Eiler sigur, at tað tó ikki bert er Miðflokkurin, sum hevur handan trupulleikan.

- Um vit taka Kristiliga Fólkaflokkin, sum nú er farin í søguna. Hvar fóru teir uppstillaðu? Í allar ættir, og tað prógvar, at teir heldur ikki hava havt eina greiða støðu.

Hann heldur, at trupulleikin hjá Miðflokkinum er, at allir teir stóru flokkarnir tosa eisini um hjartamálini hjá Miðflokkinum, og tí vinna tey ikki fram um spurningin um samband ella loysing.

- Men eg vóni fyri teirra skuld, at flokkurin fær umboð vegna góðu virðini, flokkurin hevur, sigur Hans Eiler.

- Men tað eru framvegis tríggjar vikur eftir til valið, og nógv kann broytast. Valstríðið fer at harðna og øll vápn - bæði siðilig og ósiðilig - verða tikin í brúk, sigur Hans Eiler Hammer, sum væntar, at Sambandssíðan fer at vinna valið. Og tað vil siga, at tað verða Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, sum fara at skipa samgongu.